# Vilja hjálpa foreldrum við fleiri børnum

**Javnaðarflokkurin heldur, at foreldur, sum hava fleiri børn í barnaansing, eiga at fáa avsláttur**

BARNAANSING
*Áki Bertholdsen*

Foreldur, sum hava fleiri børn í barnaansing, eiga at fáa avsláttur.

Tað heldur Javnaðarflokkurin.

Tveir av tingmonnum floksins, Kristian Magnussen og Hans Pauli Strøm, fara nú at leggja uppskot fyri tingið um at broyta lógina um um dagstovnar og dagrøkt, so at foreldur, sum hava fleiri børn í barnaansing skulu fáa systkinaavsláttur.

Teir báðir skjóta upp, at tey foreldur, sum hava fleiri børn í dagrøkt, vøggustovu, barnagarði ella frítíðarskúla, skulu sjálvi gjalda tað dýrasta foreldragjaldið.

–Men tey skulu bara gjalda hálvt foreldragjaldið fyri hioni børnini, tey hava í barnaansingini.

## Hjálpa foreldrum

Teir báðir siga, at hetta skal síggjast sum ein liður, ið at bøta um fíggjarligu korini hjá foreldrum, ið hava fleiri børn í dagstovni, dagrøkt ella í frítíðarskúla.

–Tey flestu í dag ivast ikki í, at foreldur hava rætt til at vera á arbeiðsmarknaðinum, og at teimum eigur at vera tryggjað tilboð um barnaansing við mennandi innihaldi.

Teir siga, at hjá foreldrum, ið rinda fyri fleiri børn, eru útreiðslurnar til barnaansing møtimiklar, og húski við fleiri børnum hava eisini stórar bústaðarútreiðslur og aðrar útreiðslur í sambandi við børnini.





*Uppskotið hjá Hans Paula Strøm og Kristiani Magnussen fer at kosta kommununum einar 10 milliónir um árið*

–Tað er ikki óvanligt, at foreldur hava børn bæði í vøggustovu, barnagarði og í frítíðarskúla samstundis. Rinda tey fult gjald fyri eitt barn í vøggustovu, eitt barn í barnagarði og eitt barn í frítíðarskúla, kunnu útreiðslurnar lættliga koma upp á einar 4.500 krónur um mánaðin.

Men verður uppskotið hjá teimum báðum samtykt, hevur tað við sær, at tað í hesum føri høvdu foreldrini fingið einar 700 krónur um mánaðir í avsláttri fyri barnið í barnagarði og einar 400 krónur í avslátri í mánaðin fyri barnið í fríðtíðarskúla.

–Samlaðu eykaútreiðslurnar av uppskotinum verða einar 10 milliónir krónur fyri tær kommunurnar, ið hava barnaansing.

Kristian Magnussen og Hans Pauli Strøm skjóta upp, at lógin kemur í gildið 1. januar.

Tað gera teir, tí teir halda, at tað er skeivt at áleggja kommununum eina eykaútreiðslu mitt í einum fíggjarári.

Men uppskotið hevur vakt stóra misnøgd summastaðni (sí viðtal við borgarstjóran á Tvøroyri aðrastaðni í blaðnum).

# Gongur væl við fiskiskapinum

**Klaksvík:** Týsmorgunin komu Pison, Kvikk og Núpur inn á Klaksvíkina at landa. Teir hava allir verið norðanfyri, og hóast tað ringa veðrið, so hevur ligið væl fyri. Teir høvdu góð 100.000 pund hvør, og var størsti parturin toskur. Serliga teir seinastu dagarnar hava teir fingið nógv, harímillum eisini nógvan stóran tosk.

Prísurin hevur ikki verið tann besti ta seinastu tíðina, men frá Fiskamarknaði Føroya frætta vit, at hann er á veg uppaftur í mun til tær undanfarnu vikurnar.

–Higartil hevur árið hilnast heilt væl, sjálvt um vit hava havt ringt veður tann seinasta mánaðin. Men teir fáa nógvan stóran fisk, og hetta vigar sjálvandi upp ímóti tí vánaliga prísinum. So alt í alt gongur alt væl, siga teir frá Fiskamarknaðinum.

***– re –***

# Ferðsluóhapp

**Klaksvík:** Leygardagin hendi eitt ferðsluóhapp beint við Christianskirkjuna. Ein bilur kom niðan gjøgnum Kirkjubrekkuna, og ein kom heimeftir Selheygsgøtu og skuldi omaneftir. Hesin seinni bilurin sneiddi svingið ov tíðliga av og rendi beint á hin bilin. Ein kona koyrdi henda bilin, og fýra ára gamli sonurin sat í. Drongurin slóg høvdið í forrútin, og bleiv innlagdur til eftirlit fyri heilaskjálvta á Klaksvíkar Sjúkrahús.

Leygardagin bleiv sløkkiliðið í Klaksvík boðsent. Hildið var, at tað var eldur í smoltstøðini inni í Dølum á Viðareiði. Men á veg norður fingu teir fráboðan um, at talan kortini ikki var um eldsbruna, men heldur um burturbeint rusk, sum teir brendu uttanfyri støðina. Tað var onkur, sum helt, at tað var eldur í eftir øllum roykinum at døma, og tí sendi boð eftir Sløkkiliðinum.

–Annars hevur vikuskiftið verið sera friðarligt her norðuri, verður sagt av politistøðini í Klaksvík.

***– sae –***

# Finnur og Kristian vunnu

**Finnur Helmsdal og Kristian Joensen vunnu teirra lokalfinalur í Danmarksmeistaraskapinum í tipping**

TIPPING
*Solby A. Eliasen*

Finnur og Kristian hava vunnið sær sæti í millum tey áleið 45 fólkini, sum hava kappast um at sleppa á Evroparundferð at hyggja eftir fótbólti á hægsta stigi. Túrurin gongur til Týskland, Italia og Onglands. Ikki er greitt enn, hvørjar býir ella hvørjar dystir, tey skulu til.

Túrurin er í vikuskiftinum 12.-14. apríl. Teir fáa túrin goldnan úr Føroyum og aftur. Farið verður úr Føroyum fríggjamorgun niður til Kastrup, og so víðari harfrá við leiguflogfari til Týsklands. Har fara tey at hyggja eftir einum Bundesliga dysti um kvøldið. Síðani verður farið víðari til Onglands at hyggja eftir einum Premier League dysti kl. 15:00. Áðrenn tann dystin fáa tey okkurt til matna og aftaná dystin um kvøldið verður eitt hugnakvøld, har skipað verður fyri undirhaldi. Dagin eftir verður so farið víðari til Italia at hyggja eftir dysti í Serie A.

## Aðru ferð Finnur er við

Finnur Helmsdal var eisini á Evroparundferð í 1999, og hann sigur, at túrurin er eitt stórt upplivilsi. Men tá sluppu tey ikki til Italia, tí at onkrar broytingar vóru í dystarskránni í Italia. Men so hugdu tey eftir trimum dystum í Onglandi í staðin. Á hugnakvøldinum á tí túrinum stóðu Jacob Haugaard og Hans Otto Bisgaard fyri undirhaldinum. Har vóru eisini onkrar fótbóltsstjørnur, millum annað Allan Simonsen, fyrrverandi landsliðsvenjari.

## Áhugavert fótbóltsvikuskifti

Sum sagt, er ikki greitt enn hvørjum dystum tey skulu hyggja at, men Finnur hevur kannað hvørjir áhugaverdir dystir eru um tað vikuskiftið. Í Týsklandi spæla millum annað 1.FC Kaiserslautern og BV Borussia Dortmund, í Italia, Juventus og AC Milan, og í Onglandi Manchester United og Arsenal.

–Tað hevði verið ynskiligt, at sæð hesar dystir, men tað vita vit ikki, um vit sleppa, sigur Finnur Helmsdal.

–Fótbóltsdámurin á einum vølli, sum til dømis Old Trafford er fantastiskur. Tað sita umleið 60.000 ákoðarar og rópa og syngja. Tað má upplivast.

–Sjálvur eri eg sera spentur til at fara til Italia, tí tað sluppu vit jú ikki seinast, so tað eigi eg til góðar, sigur Finnur Helmsdal at enda.







# Jónsvein Knudsen 25 ár í fiskivinnuni



*Jónsvein Knudsen hevur starvast í fiskivinnuni í 25 ár*

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Hósdagin, 21. februar, hevði Jónsvein Knudsen, reiðari, starvast í fiskivinnuni í tilsamans 25 ár. Í dag eigur hann partafelagið Snaraløk saman við Bjarna Kass. Teir hava skipini Jaspis og Ametyst og Smaragd og Safir. Haraftrat er gamli Smaragd, sum er lagdur og verður avviklaður. Nýggjur og stórur bygningur er bygdur í Saltangará, og har heldur felagið nú til í snotuligum og egnum hølum. Tann parturin av bygninginum, sum er til avlops, er allur útleigaður.

Jónsvein Knudsen byrjaði sum 19 ára gamal á skrivstovuni á táverandi Lynfrost, sum Føroya Fiskavirking í dag eigur.

- At eg minnist dagin so væl – og eisini nú 25 ár seinni, er tí, at mamma mín,Mina Knudsen, fyllir hendan dagin. Tá ið eg byrjaði, fylti hon 55; nú fylti hon 80.

Jónsvein sigur seg minnast, at honum dámdi sera væl at arbeiða á Lynfrost.

Stjóri á virkinum var Havstein Ellingsgaard.

- Um kvøldarnar og í vikuskiftinum plagdi eg at taka ímóti fiski; so hetta var ikki ein arbeiðsdagur millum kl. 8.00 og 17. Men mær dámdi arbeiði so væl, at tað hugsaði eg ikki um.

Skip hava at kalla altíð verið knýtt at Lynfrost, bæði beinleiðis og óbeinleiðis.

- Tað vóru Højgaardbrøðurnir, Hans Olivur og Ingvard, sum saman við Símuni Hansen løgdu lunnar undir virkið í 1954. Símun doyði bert 45 ára gamal av sjúku. Pápi mín, Jens Knudsen, sum doyði í 1986, var sum handverkari við til at byggja virkið, sigur Jónsvein.

## Áhugin fyri skipunum

- Sum frá leið, byrjaði eg eisini at fáast við skipini, sum Lynfrost hevði. Hetta var einpartur av arbeiðinum á skrivstovuni.

Taka vit so eitt langt lop fram til kreppuna fyrst í nítiárunum, tá ið alt fór á húsagang, keyptu Jónsvein og aðrir tá tey skip, sum knýtt vóru at virkinum.

- Fleiri, sum vóru við til at keypa skipini, høvdu ongan serligan áhuga í skipunum sum so, men vildu vera við til at skapa eitt grundarlag, so skipini kundu vera siglandi.

Í dag eigur og rekur Snaraløkur hesum skip, og reiðari er Jónsvein Knudsen, sum nú hevur starvast í 25 ár innan fiskivinnuna.

Hendan dagin, Sosialurin av tilvild datt fram við, høvdu tey køkur og annað gott at bjóða fólki, sum hugdu inn á gólvið.

## Gongur væl

Jónsvein er væl nøgdur við gongdina seinastu árini, og árið í fjør var gott hjá skipunum.

- Tað var ógvuliga torført at útvega pening til tess at skapa nakað undir kreppuni fyrst í nítiárunum. Eg vil siga, at tað er lættari at útvega miljónir í dag, enn tað var fyrst í nítiárunum at útvega 50.000 krónur, um tú vildi skapa nakað. So, hetta var ein torfør tíð, ásannar hann.

Umframt skipini, sum Snaraløkur eigur, hevur felagið eisini umsitingina av skipunum, Vesturvarða og Suðurvarða, sum Bjarti Mohn eigur.

Tilsamans hevur Snaraløkur – við manningum – eini 55 fólk í starvi.Vit ynskja Jónsveini Knudsen hjartaliga tillukku við degnum.



*Nýggi og snotuligi bygningurin hjá P/F Snaraløki í Saltangará*

# Týskir trolarar í Saltangará við góðum upsa

**- Vit keypa upsan heldur bíligari frá týsku trolarunum enn upsan, vit keypa á marknaðinum í Føroyum, hóast ES-upsin er nógv størri, sigur Jason Johannesen**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Týsdagin var týski trolarin, Susanne, í Saltangará við fullari last. Teir løgdu veiðina, sum vá 260.000 pund, upp til Fiskavirking. Væntandi landar ein annar týskur trolari, J. Von Køln, í Saltangará hósdagin. Men hetta var ikki heilt vist, tá ið vit frættu týsmorgunin.

## Góður upsi

Jason Johannesen, virkisleiðari, sigur, at Susanne fiskaði í ES-sjógvi, norðanfyri Hetland, og teir høvdu hampiliga góðan upsa, nógv størri enn tann, sum føroysku skipini fáa í løtuni.

Spurdur, um hesin fiskurin er dýrari at keypa enn upsin, sum er á føroyska marknaðinum, sigur Jason, at so er ikki.

- Vit keypa upsan heldur bíligari frá týsku trolarunum enn upsan, vit keypa á marknaðinum í Føroyum

Jason sigur, at týsku trolararnir gjøgnum fleiri ár hava lagt nakrar lastir upp í Saltangará á hvørjum ári, men hetta er so tann fyrsta lastin í ár.- Hava vit ikki kunnað keypt hendan fiskin, tí nógvur fiskur hevur verið inni, hava skipini landað til onnur virkir, men vit verða gjarna spurdir fyrst, um áhugi er fyri lastini, sigur hann.

## Smáur upsi undan Føroyum

Tey arbeiddu hvønn dag á Fiskavirking í Saltangará í síðstu viku, og soleiðis verður eisini hesa vikuna.

Jason fýlist á, at upsin, sum føroysku skipini landa, er so óvanliga smáur, hóast hetta er gýtingartíð, og tann stóri fiskurin skuldi staðið tættur.

- Eini 60% av veiðini, sum kemur uppá land, er upsi 4, sum vigar undir 1,5 kg. Hetta er næstan tann reini seiður, sum hann tekur til.Jason vísir á, at hetta plagdi at vera góð fiskitíð á Fugloyarbankanum ella eysturi í Holinum, teir rópa, men haðani kemur næstan bara smáur upsi.

- Hesa tíðina av árinum er fiskurin eisini rak, so torført er at fáa nakað burturúr honum. At kalla alt fer til blokkframleiðslu. Nú gera vit næstan ongar portiónir, men á teimum virkjum, har portiónir verða gjørdar, kann eg ikki hugsa mær, at nógv fæst burtur úr hesum fiskinum.

Virkisleiðarin sigur, at sambært fiskimonnum, ber hesin smái upsin eisini rogn.

- Men um hann gýtir, tá ið hann er so ungur, vita fiskifrøðingarnir betur atsiga enn eg, sigur Jason Johannesen.